# FUNDARBÓK HJÁ VÁGS BÝRÁÐ 2013

| | | |
|---|---|---|
| **Fundur nr. 11**<br>**Tíð:** 19. desember 2013 kl. 19.00<br>**Stað:** Kommunuskrivstovan | **Skrivari:** Pól Thorsteinsson | |
| **Fastir fundardagar:**<br>14. januar, 11. februar, 14. mars,<br>15. apríl, 30. mai, 17. juni,<br>19. august, 23. september,<br>28. oktober, 25. november,<br>19. desember | **Møttir:**<br>Allir býráðslimir | **Ikki á Fundi:** |

**1) Mál nr.: 13/00273**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmæli um eykajáttanir til fíggjarárið 2013.

Fíggjarnevndin samtykti einmælt á fundinum tann 18. november 2013, at mæla býráðnum til, at taka undir við eykajáttanunum.

Eykajáttanirnar vóru eisini einmælt samtyktar av Býráðnum, til fyrru viðgerð á fundinum tann 25. november 2013.

*Broytingarnar eru:*

| | |
|---|---:|
| Grein 1 hækkar við | 70.000 kr. |
| Grein 3 hækkar við | 1.182.000 kr. |
| Grein 4 hækkar við | 48.000 kr. |
| Grein 5 hækkar við | 428.000 kr. |
| Grein 6 hækkar við | 1.067.000 kr. |
| Grein 7 hækkar við | 400.000 kr. |
| Grein 8 Meir inntøka | 2.390.000 kr. |
| **Netto útreiðsla** | **805.000 kr.** |

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at játtað eykajáttanirnar.

Undirskriva:

**2) Mál nr.: 13/00300**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram uppskot til fundardagar í 2014.

Fíggjarnevndin samtykti uppskotið einmælt á fundinum tann 9. desember 2013.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at taka undir við uppskotinum.

**3) Mál nr.: 13/00304**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram umsókn um stuðul á kr. 25.000 frá Nýggjársnevndini.

Málið hevur hvørki verið fyri í Mentanarnevndini ella Fíggjarnevndini, tí umsóknin kom somikið seint inn til kommununa.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at stuðla við nevndu upphæddini.

Undirskriva: